## Sóknast eftir íleggjarum

Grønlendska námsvinnufelagið Nuna Minerals sóknast eftir fleiri íleggjarum. Felagið hevur gjørt stórar íløgur tey seinastu árini, og aðrar stórar íløgur standa fyri framman. Í einari roynd at fáa fatur á nýggjum íleggjarum skipar Nuna Minerals fyri einum kunnandi fundi í Kyepmannahavn hósdagin, har felagið fer at greiða frá sínum ætlanum. Nuna Minerals hevur sett sær sum mál at sleppa á eina altjóða virðisbrævaskráseting fyri námsvinnufeløg.

arahúsið og áhugaðar partar í Føroyum.

Men Rani ætlar at skapa eitt enn betri grundarlag at arbeiða út frá, og tí hevur hann eisini lagt upp til eina verkætlan saman við Granskingarráðnum.

- Tað er jú altíð ein spurningur um, hvønn veg vit skulu fara. Øllum londum tørvar jú ongantíð so nógva nýhugsan sum í dag, og tí er spurningurin, hvønn veg vit við fyrimuni kunnu og skulu ganga. Tí hevur tað stóran týdning at fáa eitt gott boð uppá, hvar teir bestu menningarmøguleikarnir hjá føroyska samfelagnum – við verðandi menniskjaliga og náttúrugivna tilfeingi – í veruleikanum liggja.

Tað gleðir meg tí stórliga, at vit í samstarvi við Granskingarráðið kunnu seta fokus á henda týdningarmikla búskaparliga spurning, sigur Rani Nolsøe.

Og í hesum sambandi mangla vit »hard facts«, sum Rani Nolsøe málber seg. Men tað er einki at ivast í, at Ívérksetanarhúsið hevur verið eitt hart tiltrongt tiltak, sum bara eftir stuttum ári hevur víst sítt virði.

Nú Ívérksetarahúsið hevur verið virkið í eitt lítið ár er tað gleðiligt at kunna staðfesta, at Føroyar av álvara eru við á íverksetaraøkinum. Eingin ivi er um, at vit koma at síggja enn fleiri og munagóð úrslit. - Tí fara vit at gera okkara fyri, at føroysk íverksetarar alsamt koma at hava optimalar møguleikar til at mennast til veruligar vakstraríverksetarar, sigur Rani Nolsøe at enda.

*Hóast bústaðurin reint fysiskt er í Klaksvík, so er Ívérksetarahúsið fyri alt landið*



# Bjarni Askham Bjarnason ikki ímóti Sandoyartunlinum

**- Hetta var bara eitt neyðarróp móti teirri raðfesting, sum løgtingið hevur gjørt nú beint undan valinum at brúka eina milliard krónur upp á tunlar. Eg havi einki ímóti, at sandoyingar fáa sín tunnil, sigur Bjarni Askham Bjarnason, formaður í Norðoya- og Vágatunlinum**

MÓTMÆLI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað elvdi til rættiligt rok, tá Rás 2 og Portalurin í gjár søgdu frá, at Bjarni Askham Bjarnason var tann fyrsti at skriva undir mótmæli móti Sandoyartunlinum, sum seinastu dagarnar man hava poppað upp á nærum hvørjari teldu í landinum.

Bjarni Askham Bjarnason er stjóri á Kalli, og hann er eisini nenvdarformaður í P/F Vágatunlinum og nevndarlimur í P/F Norðoyatunlinum. Á nýggjárinum tekur hann við sum nevndarformaður í P/F Norðoyatunlinum eisini, tí tá leggur Bergur í Garði frá sær, tí hann skal fyribils røkja stjórastarvið í tunlinum, eftir at Dávid Reinert Hansen hevur sagt seg úr starvi.

Men tað var altso mikudagin, at heimasíðan við mótmælinum fór av bakkastokki, og var tað Hans Blåsvær í Havn, sum tók stig til hana og skrivaði undir hana. Síðani var Bjarni Askham Bjarnason tann fyrsti at skriva undir.

Vit spurdu Bjarna Askham Bjarnason, um hetta ikki var illa umhugsað?

- Nei, tað dugi eg slett ikki at síggja. Tað sum eg havi skrivað undir, er tann raðfesting, sum løgtingið hevur gjørt beint framman undan einum vali - at brúka eina milliard krónur til tunlar, samstundis sum vit dumpa í Pisa, Hoydalar sær út sum ein ruin og fróðskaparsetrið er ein onnur ruin. Tað var eitt neyðarróp í mun til, hvussu vit prioritera, sigur Bjarni Askham Bjarnason.

- Eg havi einki ímóti, at sandoyingar fáa ein tunil, men beint nú mugu vit raðfesta útbúgving fyrst og fremst, sigur hann.

Spurdur um hetta ikki er ótrúverdugt, tá formaðurin í báðum undirsjóvartunlunum á hendan hátt setir seg ímóti tí triðja tunlinum, svarar Bjarni A. Bjarnason:

- Hetta er ein spurningur um raðfesting. Teir tunlarnir, sum eg umboði eru gjørdir eftir einum øðrum leisti, enn man ætlar at gera Sandoyartunnilin eftir. Og eg umboði ikki tunlarnar, eg umboði meg sjálvan sum privatpersón, tá eg havi skrivað undir hetta mótmælið. Eg eri valdur í nevndina fyri tunlarnar eftir nøkrum fakligum kvalifikatiónum. Hvønn holdning eg havi privat hevur einki við hetta at gera. Vit liva í einum demokratiskum samfelag og eg má hava rætt at siga mína ónøgd, sigur Bjarni A. Bjarnason.

Rás 2 spurdi hann eisini, um hann var ímóti Vága- og Norðoyatunlunum, áðrenn teir vórðu gjørdir:

- Nei, tað var eg ikki. Og eg eri ikki móti Sandoyartunlinum, men eg eri ímóti teirri raðfestingini, sum her er gjørd, leggur hann dent á.

Við Rás 2 í morgun sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum og sum á tann hátt umboðar eigaran av tunlunum, at tað er óumhugsað av Bjarna Askham Bjarnason at skriva undir hatta mótmælið.

- Eg eri samdur við honum í, at hann sum privatpersónur hevur rætt at úttala seg, men var tað eg, sum sat í hansara stað, so hevði eg ikki gjørt tað. Onkuntíð er best at tiga, sigur Bjarni Djurholm.

Tey politisu valfeløgini í Norðoyggjum siga í mótmælisskrivi, at tað er moralskt ósambærligt, at nývaldi formaðurin í Norðoyatunlinum alment arbeiðir ímóti, at suðurøkið verður knýtt at meginøkinum. Feløgini eftirlýsa eisini almennar grundgevingar fyri, hví Bjarni Askham Bjarnason er vorðin formaður fyri Norðoyatunnilin.

Við Norðlýsið í morgun sigur Heri Hammer, býarverkfrøðingur í Klaksvík og nevndarlimur í Norðoyatunlinum, at tað undrar seg ikki sørt, at nevndarformaðurin skrivar undir slíkt.

Hann viðurkennir eisini rættin hjá honum at úttala seg, men sigur tó, at tá tú tekur av einum tilboð um at verða valdur í eina almenna nevnd, so eigur tú sjálvandi altíð at verða loyalur yvir fyri tí felag, sum ein er valdur at stjórna.

Í skrivandi stund hava 2.247 fólk afturat Bjarna Askham Bjarnason skrivað undir mótmælið.

MARGLÆTI Í GERANDISDEGNUM
frá HVS serfrøðinginum

Midocean



M-D026
Brúsukabina
Úr bláum herdaðum glasi. Við setri, hand- og toppbrúsu, blandingsbattarii, spegli, radio og 6 ryggmassagudysum.

Mál:
95 x 95 x 220 cm.

kr. 10.990,-
Vanl. prísur kr. 13.200,-



M-B022 Gosbað
Við ryggmassagu, radio, varmalikami, blandingsbattarii og framsíðu.

Mál: 180 x 85 x 65 cm.

kr. 13.990,-
Vanl. prísur kr. 16.300,-



M-R774 Brúsupanel
Snøgt tilevnað úr bláum sanitetsacryl. Við handbrúsu og blandingsbattarí.

Mál: 40 x 158 cm.

kr. 5.990,-
Vanl. prsur 7.100,-kr.

Tilboðið er galdandi 4.-15. des. 2007 so leingi vøra er tøk.

Maria Poulsen

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo